## Toskaaling skal ikki hava stuðul

Landsnevndin í norska útróðrarmannafelagnum krevur, at myndugleikarnir gevast við at veita toskaaling fíggjarligan stuðul, og felagið krevur samstundis, at tað verður útgreinað, hvønn leiklut toskaalingin skal hava í framtíðini. Í einari fundarsamtykt sigur landsnevndin eisini, at myndugleikarnir siga ikki at lata fleiri loyvi til toskaaling. Útróðrarmenninir siga, at tann aldi toskurin kappast við tann vanliga toskin, sum hevur stóran týdning fyri útróðurin, og teir kunnu tí ikki góðtaka, at tað almenna stuðlar kappingarneytan. Harafturat vísa teir á, at tess meiri toskur verður aldur, tess størri verður trýstið á prísin.



## Svii dømdur fyri yvirgang

Eitt nevningating í New York hevur dømt ein 43 ára gamlan svia sekan í yvirgangi. Sambært svensku tíðindastovuni var sviin ákærdur fyri 11 lógarbrot, og hann bleiv dømdur sekur í øllum. Maðurin, sum er av libanskum uppruna, var millum annað ákærdur fyri at hava verið við í einari ætlan um at burturflyta og myrða fólk í einum øðrum landi. Hann var eisini ákærdur fyri at hava skipað eina venjingarlegu fyri yvirgangsmenn í amerikanska statinum Oregon. Sviin bleiv tikin í altjóða floghavnini í Prag í desember í 2005. Tá hevði Interpol leitað eftir honum í fleiri ár, skrivar TT.

# Aldargamalt markastríð avgreitt

**Seinastu øldina hava Vestmanna og Kvívík verið ósamdar um markatalsmarkið. Nú hevur Føroya rættur avgjørt, at avgerðin hjá matrikulstovuni er galdandi. – Tað er ein møguleiki fyri, at vit skjóta dómin inn fyri landsrættin, sigur Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna**

MARK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Seinastu øldina hava Vestmenningar og Kvívíkingar verið ósamdir um markið. Í 2006 kom matrikulstovan við síni avgerð um markatalsmarkið millum Kvívík og Vestmanna. Hesi avgerð vildi Vestmanna kommuna ikki taka undir við. Størsta stríðið var um brúksrættin til havbotnin, harundir útbyggingar av havnum og so framvegis.

Í 2005 ætlaði Vestmanna kommuna at byggja út á havnarøkinum, harundir 200 fermetrar skuldu verða fyltir í ómatrikulerað sjóøki millum bygdirnar.

Av tí, at markatalsmarkið ongantíð var avgreitt, so valdi Matrikulstovan at avmerkja markatalsmarkið.

Hetta mark vildi Vestmanna kommuna ikki ganga við til og valdi at fara í rættin við hagapørtunum í Kvívík og Matrikulstovuni.

Málið hevur síðani koyrt í rættiliga langa tíð, og mánadagin varð dómur sagdur, og teir saksøktu vórðu fríkendir.

### Fríkendir

Rætturin avgjørdi, at onki bendi á, at Matrukulstovan hevði sett mark uttan heimild, tí Matrikulstovna hevði arbeitt eftir vanligu treytunum í tílíkum málum.

Somuleiðis er greitt, at Vestmanna kommuna skal rinda rættarkostnaðin á 40.000 krónur tilsamans til hagarpartarnar í Kvívík og Matrikulstovuna.

### Bátahylur í klemmu

Eitt annað mál er framvegis í rættinum um rættindini til sama øki, men tað er eitt stríð millum Vestmanna og Kvívíkar kommunu um ein bátahyl á Válinum.

Hetta stríð er lagt á ís, men verður nú tikið uppaftur, um hetta stríðið um brúksrætt av havbotni ikki verður skotið inn fyri hægri rætt.



